## DAGSINS MEINING

# Lemjandi tap – ein góður lærari

Norski arbeiðaraflokkurin var fyri einum lemjandi ósigri á valinum mánadagin. Víst gekk Sosialistiski Vinstriflokkurin fram, men hann gekk ikki líka nógv fram, sum Arbeiðaraflokkurin fór aftur, so tilsamans er vinstrivongurin í norskum politikki viknaður munandi. Í hvussu so so mikið nógv, at hann hevur ikki parlamentariska grundarlagið undir eini stjórn uttan stuðul frá miðflokkinum, Senterflokkinum.

Saman við Sosialistiska Vinstraflokkinum vann tann konservativi flokkurin, Høgi-lokkurin, valið mánadagin. Afturímóti fekk tann miðsøkjandi Kristiligi Fólkaflokkurin aftur, og tann hørasinnaði Framburðsflokkurin helt nøkurlunda støðu sína. Tað var væntandi, at Høgri-flokkurin fór at vina valið, eftir at flokkurin hevur verið í einum aldudali í eini 10 ár. Fleiri formenn hava roynt seg, men tað er ikki eydnast fyrr enn nú at reisa flokkin aftur.

Hóast tapara og sigursharrar er ikki lætt at skipa stjórn í Noregi. Miðflokkarnir, og serliga Kristiligi Fólkaflokkurin, avgera, um Noreg fær eina miðhøgrastjórn ella eina mið-vinstrastjórn. Spurningurin er, um formaðurin í Kristiliga Fólkaflokkin, Kjell Magne Bondevik,vil skapa eitt betri vælferðarsamfelag saman við Jens Stoltenberg í Arbeiðaraflokkinum og Kristin Halvorsen úr Sosialistiska Vinstraflokkinum, ella saman við Jan Pedersen úr Høgra-flokkinum.

Eitt betri vælferðarsamfelag tykjast allir flokkar at vera samdir um. Og her er helst orsøkin til lagnuvalið hjá Arbeiðaraflokkinum. Hann hevur ikki tikið ynskið hjá norska fólkinum um at brúka meiri pening til heilsu-, almanna og skúlamál í álvara Flokkurin hevur hugsað ov nógv um ein varnan fíggjar- og búskaparpolitikk fyri ikki at hita búskapin ov nógv upp, enn vælferðina hjá fólki. Hetta skilur fólkið ikki, tí Noreg eigur nógvan pening, einar 500 milliardir í oljugrunnum. Sjálvt Høgri-flokkurin hevur sett fyri at brúka meiri pening til skúla- og útbúgvingarmál.

Valið hjá Arbeiðaraflokkinum er tað ringasta síðani í 1927, og ósigurin er kanska eina lærari hjá øðrum javnaðarflokkum, sum viðhvørt tykjast at gloyma upprunan, tað vanliga fólkið, løntakaran, fólkið í tí lokala og menniskjaliga útjaðaranum. Hetta er í øllum førum nakað, Javnaðarflokkurin eigur at hugsa um, nú hann hevur landsfund og skal stinga út í kortið eina nýggja virkisskrá. Tað skuldi ikki verið torført, tá vit vita, -at 500 fólk bíða eftir at sleppa inn á ellis- og røktarheim, -at skúlin er afturúrsigldur, -at 40 sálarveik ikki hava ein bústað, -at Landssjúkrahúsið er fullkomiliga niðurslitið, -at vit ongan íbúðapolitikk hava og vanligir løntakarar ikki hava ráð at seta fót undir egið borð í høvuðsstaðnum o.s.fr.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Áheitan á allar limir Javnaðarfloksins

**Føroya Javnaðarflokkur**

Komandi fríggjakvøld verður landsfundur Javnaðarfloksins settur í skúla-auluni í Vetsmanna og heldur fram leygardagin.

Nú tvey val standa fyri durum, har serliga løgtingsvalið kann fáa alstóran týdning fyri framtíð okkara, fer flokkurin á landsfundinum at leggja fram uppksot til politiska innihaldið fyri komandi valskeiðið.

Tí er tað av stórum týdningi, at limir floksins møta fjølmentir og bera sína hugsanir fram.

Javnaðarflokkurin er tín flokkur, og tú hevur tín sjálvsagda rætt til at ávirka floksins politikk, og er landsfundurin besta høvið til at gera júst tína ávirkan galdandi.

Møtið tí fjølmentir. Tykkara áhugi er floksins styrki.

# Undir Fólkafloksleiðslu er næstan alt í hesum landi endað í einum hurlivasa

**Edmund Joensen**



Til seinasta løgtingsval, fingu teir sokallaðu loysingarflokkarnir 18 av 32 tingmonnum valdar, og harvið høvdu teir tryggjað sær reinan meiriluta á løgtingi. Loysingarsamgongan varð skipað við Fólkaflokkinum á odda, og nú skuldi loysast eftir íslendska modellinum frá 1918. Hetta modellið hevði Fólkaflokkurin, undan valinum tikið til sín og marknaðarført, sum sítt egna.

Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Gamla Sjálvstýrið høvdu aftur valdið í Føroyum.

Seinast tá hetta hendi vóru árini 1963 til 67, tá somu flokkar, stuðlaðir av Framburðsflokkinum, høvdu fingið valdið í sínar hendur. Høvuðsendamálið hjá flokkunum tá og nú er ikki nevnivert broytt. Loysing og kvetting eru umdoypt til fullveldi og fult sjálvstýri, helst í eini roynd at fáa tað at glíða betur niður hjá Føroya fólki.

Í fyrra tiltikna loysingarlandsstýrisskeiðinum átti Fólkaflokkurin eisini løgmann, Tjóðveldisflokkurin átti varaløgmann, og Sjálvstýrisflokkurin var við sum hann plagar. Framburðsflokkurin stuðlaði uttan landsstýrissess, og kann hann sostatt leysliga samanberast við rolluna hjá Jenis av Rana í dag.

Í tí landsstýrisskeiðinum hendu tíbetur fyri føroyingar ikki tær stóru broytingarnar á ríkisrættarliga økinum. Sagt plagar at verða í skemti, at bara jólaheilsurnar blivu yvirtiknar tey fýra árini.

**Vandi í hvørjari vælferð**

Av tí at einki hendi ta fyrru ferðina, hava Føroya fólk kanska havt lindi til at undirmeta vandan í at atkøvða fyri hesum flokkum. - Lívið heldur jú fram, sjálvt um vit ongar jólaheilsanir fáa.

Men undir hesum landsstýrinum skuldi tað tó vísa seg ørvísi. Loysast skuldi her og nú eftir eini sokallaðari skipaðari ætlan. Dato varð sett á hvørt nikk og prikk. Ein ørgrinna av peningi varð brúkt til propaganda í skrivt og í talu, og partur av umsitingini luttók eisini í herferðini o.s.fr.

Føroya fólk fekk frá sjálvum løgmanni at vita neyvt dato fyri, nær tey skuldu á fólkaatkvøðu, fyri at komfirmera ætlanina hjá honum, landsstýrinum og samgonguni. Hetta var sum at koma inn í ein sjálvtøkuhandil, har hillarnar stóðu fullar av leskiligum vørum, sum einki skuldu kosta fyri kundan.

**Syndarligt úrslit**

Úrslitið er syndarligt. Sjálvandi bar ætlanin ikki, og tað vistu øll, sum bara hugsaðu eitt lítið sindur. Føroya fólk tók heldur ikki undir við loysingini, tí tey vistu, at slíkt altíð kostar.

Alt í hesum landi er nú endað í einum stórum hurlivasa. Tað sum skuldi vera ein glasilig sokallað skipað fullveldistøka, er vorið ein eyðmýkjandi biddaragongd eftir donskum pengum, NATO- pengum og grenjan til ST eftir tjóðarrættindum.

Ríkisfelagsskapurin er gjørdur upp í krónum og oyrum, og prísur er settur á hvønn einasta føroying sum lesur, er á sjúkrahúsi, ella av øðrum orsøkum er búsitandi í Danmark. Landsstýrið hevur brúkt alla sína orku til at forpesta viðurskiftini í ríkisfelagsskapinum. Sjálvsøgd rættindi, sum føroyingar áttu í ríkinum, eru gjørd til ivasom rættindi.

Mest ítøkiliga úrslitið higartil er ein eyka rokning á nýggjárinum til allar føroyingar uppá umleið 400 mió. krónur, hvørt ár framyvir. Tað kunnu vit higartil siga við vissu, at henda samgongan hevur fingið burturúr.

**Hurlivasi**

Sannast má, at undir Fólkafloksleiðslu, er landið hesuferð endað í einum stórum hurlivasa. Tað verður ein stór avbjóðing at taka upp eftir hesa samgonguna, og tað fer at taka langa tíð at bøta teir stóru skaðarnar aftur, sum hendir eru seinastu fýra árini. Tað er vist.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Óndskapurin hevur orðið

**Jóanes N. Dalsgaard**



Týsdagin 11. september 2001 tók óndskapurin orðið. Og tað so hart, at tað hoyrdist um allan heim. Henda sama morgun fóru fólk í túsundatali til arbeiðis, uttan minsta gruna um, at dagurin, sum bíðaði, skuldi gerast teirra seinasti her á fold. Fólk í túsundatali eru deyð, fleiri ferðir so nógv hava fingið mein, og hugsa vit um hvussu nógv eru meint rakt tosa vit um fólk í milliónatali. Ræðuleikin er so stórur, at hann er ikki til at fata. Og tað í sær sjálvum, kundi verið ein góð undanførsla, fyri at lata vera við at royna at fata. Tað er so nógv lættari at uppfinna einføld svar uppá truplar spurningar, enn tað er at royna at fata tað trupla. At fata, ikki minst tílíkar ræðuleikar, sum teir heimurin í vikuni hevur verið vitni til, krevur tíð og orku hjá tí einstaka, og hjá samfelagnum. At fata tað ófatiliga krevur harafturat, at vit seta spurnartekin við grundarlagið undir tí fatiliga. Tá tað ófatliga er hent, ber ikki til bara at siga, at tað er ófatligt, og tí lata vera við at fata at tað er hent. Tað hevði verið at krógva seg fyri veruleikanum. Og skulu vit halda fram við at liva, so noyðast vit onkursvegna at koma til sættis við veruleikan, soleiðis sum hann sær út.

Í dag er veruleikin grummur at síggja til. Nógv grummari enn ein ungur maður sum eg, havi upplivað fyrr. Men tey, sum eru komin uppí árini, hava áður uppliva, hvussu grummur veruleikin kann vera. Eldri fólk í dag minnast tíðina eftir seinna heimsbardaga, tá tann ófatiligi nasistiski óndskapurin bara spakuliga læt seg fata, ígjøgnum eina ræðuliga og pínufulla uppgerð við eina trygga og fjálga ímynd av tí góða í menniskjanum. Bara við at fata, og koma til sættis við, at óndskapurin býr í okkum øllum, bar til at fata nasistisku ræðuleikarnar áðrenn og undir seinna heimsbardaga. Tað er óndskapurin í okkum øllum, sum fær okkum at lata eyguni aftur fyri óndskapinum í okkum øllum. Tí óndskapurin trívist best í okkum, tá vit ikki eru varð við hann. Tí er tað bert í teirri løtu at vit varnast óndskapin í okkum sjálvum, at vit kunnu temja ella tálma hann, og í staðin royna at gera tað góða. At náa hesum málið krevur eitt stórt stríð. At gera tað góða er eitt stórt og áhaldandi persónligt stríð, sum má stríðast úti ímillum onnur menniskju. At gera tað góða krevur, at vit persónliga taka støðu, at vit støðugt hugsa um okkara persónligu støðu, og at vit virka í samsvari við hesa persónligu støðu. Bara við at gera tað góða kunnu vit halda óndskapinum frá lívinum.

Óndskapur er at lata standa til. Óndskapurin fær orðið, tá vit gevast við at ivast í okkara egna fullkominleika. Tann óndasta gerðin er at kasta ábyrgdina frá sær, at lata onnur hugsa fyri seg. Menniskjan verður ónd, tá hon velur at verða eitt amboð hjá øðrum. Menniskjan verður ónd, tá hon velur at geva seg yvir til sín egna óndskap.

Tí eru tað ónd menniskju, sum standa aftanfyri og sum hava framt yvirgangsatsóknirnar í USA. Tað eru ónd menniskju, sum hava frásagt sær rættin at vera roknað sum menniskju. Tað eru ónd menniskju, sum ikki taka ábyrgdina av sjálvi at vera menniskju. Tað eru ónd menniskju, sum royna at vinna persónlig mál, við at týna onnur menniskju. Tað eru ónd menniskju, sum lata standa til.

Óndskapurin stendur spillnakin og ræðuligur á at líta á Manhattan. Í týndum mannalívum og syndraðum mannalagnum er óndskapurin her, so víðfevndur og harðrendur, sum sjálvdan áður í heimssøguni. Men uttan óndar einstaklingar, var eingin sorgarleikur á hesum sinnið. Talið á deyðum og løstaðum, sigur í sær sjálvum einki um, hvussu nógvan óndskap talan er um. Óndskapurin er altíð líka óndur tá hann sleppur til orðana. Tann óndi gerningurin kann vera meira og minni ræðuligur, meira og minni syndarligur, men hann er altíð líka óndur. Tað uttan mun til um talan er um sjálvmorðsatsóknir í New York og Washington, ella talan er um meiningleys kníválop í Havnargøtum. Mátti hvør einstakur okkara gjørt sítt til, at tálma óndskapin innaní okkum sjálvum, og í so máta verið ein fyrimynd fyri okkara medmenniskju og okkara børn. Tað skal vera mín stilla bøn í hesum ræðuligu løtum.

# Tvær kvinnur og list

Tann 15. sept. 2001 kl. 14.00, letur upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Tað eru tær báðar, Inge Nepper Bakmann og Vígdis Sigmundsdóttir, sum sýna fram málningar, klippmyndir og keramik.

Inger Nepper Bakmann er fødd í 1939 og uppvaksin uttanfyri Randers. Aftaná sína sjúkrasystraútbúgving, og seinni heilsusystir, tók hon eisini prógv sum sosialráðgevi. Fyri umleið 25 árum síðani flytti hon saman við familju síni til Norðurjylland.

Sum málari og keramikari er hon autodidakt, men hevur verið á nógvum skeiðum ymisk støð, millum annað á Kunstakademiet í Århus og á Internationala Ceramic Center við Skælskør.

Íblásturin fær hon frá sínum nógvu ferðum úti í verðini sum hon ger, bæði vegna arbeiði og sum privatur persónur. Inga hevur altíð blýant og tekniblokk við á slíkum ferðum. Eisini fær hon íblástur frá sínum heimliga umhvørvi, har hon býr tætt við sjógvin og við stórum víddum, beint við Vesturhavið.

Inga arbeiðir eisini nógv við leiri, hetta hevur fascinerað hana líka síðani hon var barn.

Inga hevur útstilla í Kulteruhuset í Randers, í fleiri bankum og sparikassum í Danmark, Í Majdal Kirke í Holstebro, Galleri KC Fjerritslev, Galleri 1678 í Brovst og verið við á ólavsøkuframsýning í Norðurlandahúsinum í Føroyum.

Vígdis Sigmundsdóttir hevur fingist við list í mong ár.

Hon hevur verið við á ólavsøkuframsýningum í eini 30 ár, haft framsýningar í Smiðjuni í Lítluvík fleiri ferðir, separat ella saman við øðrum. Somuleiðis á torginum í SMS og Lions Club Eysturoy og í Havn, hevur hon ofta verið við.

Í Danmark hevur Vígdis útstilla í Kulturhuset og Værksted´s Galleriet í Randers og í Føroyahúsinum í Keypmannahavn tvær ferðir.

Í 1999 stóð hon fyri Pinkuframsýningini á Stykkinum, saman við 20 øðrum luttakarum, nógv fólk vitjaðu framsýningina.

Seinasta framsýningin hjá Vígids, var í januar mánað í ár, har hon hevði separata framsýning í Galleri Sct. Gertrud í Keypmannahanv, framsýningin var væl vitjað, seldar vóru mllum annað trý av hennara klipp-myndum til A. P. Møller

Vígdis hevur í nógv ár fingist við at gera pappírsklipp, hon ger nógv burtur úr perspektivinum, kompositión, og henni dámar væl, tá sólin gevur henni ljós og skugga at arbeiða við.

Vígdis hevur gjørt plakatir og postkosrt av klippum og hava tey verið sera væl umtókt og væl móttikin í sølubúðunum kring landið.

Íblásturin fær hon frá stórleikanum í okkara vøkru føroysku náttúru.

Inga og Vígdis kennast frá teirri tíð saman, tá tær vóru sjúkrasystranæmingar í Randers, seinast í 50´árunum.

Í frítíðini gingu tær tá á ymiskum listarligum skeiðum saman, eitt nú at modellerað við leiri, tekna croquis, mála við olju og við vatnlitum.

At hava hesa framsýningina saman, er ein gamalur dreymur hjá teimum báðum, ið nú er vorin veruleiki.

# Amerada Hess undir boring

TÍÐINDASKRIV FRÁ OLJUMÁLASTÝRINUM
*12. september 2001*

Seinnapartin hevur Oljumálastýrið latið Amerada Hess (Faroes) Limited góðkenning at fara undir leitiboring eftir olju á føroyska landgrunninum.

Tað er boripallurin Sovereign Explorer, ið skal standa fyri boringini hjá Amerada Hess (Faroes) Limited. Sovereign Explorer arbeiðir í løtuni við at læsa brunnin, sum er boraður fyri Statoil samtakið, og væntandi verður hetta arbeiðið liðugt um nakrar dagar.

Amerada Hess (Faroes) Limited er fyristøðufelag í samtakinum Faroes Partnership, ið umframt Amerda Hess fevnir um British Gas, DONG og Atlantic Petroleum.

Faroes Partnership eigur loyvi nummar 001, sum fevnir um eitt øki í ein landsynning úr Føroyum uppat landgrunsmarkinum millum Føroyar og Bretland. Brunnurin verður boraður á 4° 54’ 58.65”V og 60° 22’27.9” N. Havdýpið á staðnum er umleið 950 metrar.

Boringin hjá Amerada Hess, ið er mett at taka 2 — 3 mánaðar, verður seinasta leitiboringin á føroyska landgrunninum í ár. Boriskipið West Navion borar framhaldandi fyri BP á loyvi nr. 004.